# stættastríðið





egnu børn arbeiðaran)? Hvar er solidaritetskenslan hjá Ingeborg við útlendingum, sum royna at skapa sær eina tilveru sum arbeiðarar í hesum landi, samstundis sum teir tilføra ein førleika, sum samfelagið als ikki eigur frammanundan? Hvar er solidaritetskenslan við tey lágløntu á almenna arbeiðsmarknaðinum. Umfatar »stættastríðið« ikki tey? Eru teirra livikor altíð nøktandi?

Ingeborg! Øll góð ynski til tín sum samráðingarleiðara. Men minst til at brúka títt vald til at stuðla øllum útsettum, ikki bert teimum í tínum egna fakfelag, men eisini teimum, sum ikki hava somu møguleikar fyri javnbjóðis luttøku í hesum samfelag, sum tey flestu. Hetta í staðin fyri at krita strikur upp og skapa mørk. Sum ein týdningamikil aktørur í politiska spælinum í Føroyum kanst tú hava avgerandi týdning fyri menningina og harvið, hvar vit eru sum samfelag um nøkur ár!

Hesin konservativi longsulin eftir einfaldni frá einari farnari tíð er ikki vegurin fram. Siðbundnu formarnir fyri samhaldsfesti eru ofta diskriminerandi og intolerantir og virka við skipaðari útihýsing av »hinum«. Bara at vísa samhaldsfesti við »sínum« skapar ikki sameining í einum fløktum og samansettum samfelag sum okkara, heldur tvørturímóti.

## Nýggir ójavnar

Jóannes Eidesgaard vísir sambært Dimmalætting tann á, at teir útstoyttu (marginaliseraðu) bólkarnir í samfelagnum skifta frá tíð til aðra. Arbeiðarin hevur verið ein útstoyttur bólkur. Í dag, metir Jóannes Eidesgaard, eru tað t. d. einsamallar mammur og fólk, ið bera brek, íð kunnu vera tey »útstoyttu« í samfelagnum. Ikki tilvitað, men sum ein avleiðing av samfelagsskipanini. »Øll« eru ikki longur arbeiðararørslan í fatanini arbeiðarafeløgini. Tað sentrala í argumentatiónini hjá løgmanni er, at Javnaðarflokkurin ikki longur bara kann vera flokkurin hjá arbeiðararørsluni, men skal tryggja vælferð fyri øll í samfelagnum. Í framtíðini fer flokkurin í størri mun at venda eyguni ímóti tí nýggja ættarliðnum, sum nú nýtir gott av rættindunum, sum arbeiðararørslan bardist fyri. Tørvurin hjá teimum er útbúgving, góð ansingartilboð til børnini, góð pensjón og umsorganartilboð til tey eldru. Tað snýr seg sostatt um tann breiða miðalklassan. Møguliga eitt hugtak, sum eisini er á veg í søguna.

At Javnaðarflokkurin roynir at fevna breiðari og appellera til eina breiða, talsterka, miðalstætt, er ikki eitt nýtt fyribrigdi. Longu í 1930'unum fór danski Javnaðarflokkurin frá at vera ein arbeiðaraflokkur til at vera ein fólkaflokkur, sum appeleraði til fleiri bólkar í samfelagnum, fyri at tekkjast fleiri veljarum. Skiftið kom nakað seinni í Føroyum. Siðbundna arbeiðarastættin hevur í nógv áratíggju verið lutfalsliga lítil í tali. Tó skapar tað eitt slag av skizofreni í flokkinum at skula taka avleiðingar av veruligu samfelagsbroytingunum í mun til søguligu missiónina at frelsa arbeiðarastættina. Realpolitiska støðan júst nú, har Javnaðarflokkurin helst má slúka nógvar kamelar fyri yvirhøvur at hava ávirkan í verandi samgongu, noyðist ikki at broyta grundleggjandi hugsjónina, men kann sjálvsagt skaka ímyndina av flokkinum sum ein flokk fyri inklusión og einum samhaldsfastum samfelagi.

At formaðurin í Javnaðarflokkinum júst nú, hann er í eini borgarligari samgongu, proklamerar eina uppgerð við avmarkaðu hugsjónina um, hvat ein sosialistiskur flokkur er, er ikki so løgið. Kroystur av samgongufeløgunum ella ikki, so er tað hugstoytt at síggja, at hvussu lítið flokkurin higartil hevur fingið burturúr á sosialpolitiska økinum, meðan hann hevur sitið í samgongu. Tó sær tað út til, at fólkaheilsan fær breiða undirtøku. Eisini fólksliga sæð. Men fólkaheilsa handlar um nógv meir enn ókeypis frukt til skúlabørn og statsskipaðum rennidøgum. Fólkaheilsa handlar eisini um at tryggja fólkið neyðuga búskaparliga rásarúmið til at liva sunt. Kanningar vísa, at tey sum eru vælbjargaði fíggjarliga og útbúgvingarliga eisini eta og liva sunnari, enn tey fátøku og tey uttan útbúgving, tí tað krevur yvirskot í gerandisdegnum, at liva eitt sunt lív.

Sum víst var á omanfyri, so hevur moderniteturin ymiskar avleiðingar. Tað seinmodernaða samfelagið og serliga postídnaðar arbeiðsmarknaðurin virkar útveljandi innan verkafjøldina. Einstaklingurin, sum ikki frá náttúrunar hond ella av sosialum grundum er tillagaður treytirnar í seinmodernitetinum, verður frákoblaður týdningarmiklum samfelagsligum stovnum og skipanum, ikki minst arbeiðsmarknaðinum. Broytingarnar í arbeiðsmarknaðinum krevja samansettar og nógvar førleikar, sum skapa nýggjar úrvalsformar. Menningin hevur við sær nýggjar sosialar ójavnar og býti av sosialum ágóðum.

Eitt av aðalmálunum (fyri bæði Javnaðarflokkin og allar hinar flokkarnar) í dag má vera at skapa val og møguleikar fyri allar borgarar at menna førleikar, sum krevjast fyri at luttøku í teim samfelagsskipanum, sum vit kunnu semjast um, eru konstuktivar. Altavgerandi er tá ein politikkur, sum tryggjar, at materiellu viðurskiftini ikki forða fyri luttøku – eitt nú sum avleiðing av, at fólk ikki megna/tíma/orka at innrætta seg borgaraligt, sum fólk flest, men liva einsamøll við børnum t.d. Ella at einhvør likamlig ella sálarlig forðing ikki útihýsir fólki, sum annars hava ressursur, frá luttøku í arbeiðsella samfelagslívi yvirhøvur. Útbúgving hevur stóran týdning, ikki bara fyri komandi ættarlið, men eisini verandi, sum áhaldandi má útbúgva seg, fyri at kunna luttaka í samfelagnum, sum broytist við rúkandi ferð og gerast alt meiri samansett og torgreitt.

Mest av øllum kemur føroyski ófaklærdi arbeiðarin at merkja avleiðingarnar av samfelagsgongdini, serliga globaliseringini. Ikki bara tí at fólk koma hendavegin uttanífrá og skapa órógv í Ingeborg´sa rekkjum. Men serliga tí globaliseringin tendentielt útihýsur føroyska arbeiðaran, soleiðis sum hann brúkar sína arbeiðsmegi í dag. Føroyski arbeiðarin kann ikki kappast við arbeiðaran í láglønarlondunum eystanfyri. Tí mugu vit menniskjansliga satsa upp á dugnaskap og menningargleði og vinnuliga sæð upp á nýskapan, øðrvísi dygd og betri góðsku fyri at vera við. Tað krevur íløgu í menniskja. Staturin skal vera ein sosialur íleggjari, sum styrkir tær menniskjaligu ressursurnar. Bæði fyri at hjálpa vinnuni, men eisini fyri at brynja fólk við teimum neyðugu kompetansum, sum krevst fyri luttøku í seinmodernaða samfelagnum. Tað skuldu veri felagsmál hjá arbeiðarafeløgunum og Javnaðarflokkinum, heldur enn klandur um, um høvuðsmálið á dagsskránni er stættastríð ella ei.

**Bókmentir:**
*Kontinuitet og Forandring* (2000), Jørgen Elm Larsen et.al;
*Sociologiske visioner* (2003), Michael Hviid Jacobsen;
*Modernitet, velfærd og solidaritet* (2002), Søren Juul;
*Anthony Giddens* (2000), Lars Bo Kaspersen.
*Sosialurin* og *Dimmalætting*.